VIÐMERKINGAR

# Einskiljing/Fráskiljing?

**Tom Silvurdal**

Fyrst ein tøkk til Árna Arge og nevndina í Fiskasøluni

- - - -

Mánadagin 29.11.04, legði okra løgmaður pípuna og fór til arbeiðis saman við Harra Djurholm, landsstýrismanni.

Úrslitið fræ̈ttu okur í gjáramorgunin: Nevndin og stjórin á Fiskasøluni uppsøgd og Fiskasølan løgd saman við Fiskavirking.

Er hetta ein beinleiðis avleiðing av fundi ímillum Framtaksgrunnin, løgmann og Djurholm?

Árni Arge, fyrrverandi stjóri, og nevndin í Fiskasøluni, hava megnað at skapt virksemi í Suðuroy. Flakavirkið í Hvalba er virkið og nú er virksemið á Palm Seafood í Vági byrjað aftur og eini 20-30 fólk hava fingið arbeiði.

Teir, sum nú eru sendir til hús, hava megnað meira enn teir báðir harrarnir í Tinganesi og leiðslan/-stjórin í Fiskavirking hava megnað her í Suðuroy!

Í Vági hevði Fiskavirking við stjóranum, Meinhard Jacobsen, ætlanir um at byrja virksemi á gamla Polarfrost í august í ár.

Enn er einki hent hesum viðvíkjandi.

Undirritaði tosaði sjálvur við Meinhard í telefon í maj mánaði í ár.

Hettar var í samband við royndirnar at byrja eitt turkivirki í Vági. Okur vóru fleiri vágbingar um hesa verkætlan. Lánveitarin, Føroya Banki, setti spurnartekin við rávørugrundarlagið fyri einum slíkum virksemi í Suðuroy. Fyri at tryggja rávørugrundarlagið, fekk Meinhard/Fiskavirking, bjóðað at koma við í hesa ætlan sum partaeigari.

Eitt turkivirki í Vági hevði givið arbeiði til 20-40 fólk, alt eftir rávørugrundarlagnum. At Føroya Fiskavirking, saman við vágbingum, fór undir virksemi í Vági, hevði bøtt um teirra umdømi her og vildi verið við til at fingið ágangin um at lata virkið í Vági upp, til at linka.

Men stjórin kunnaði meg um, at teir høvdu eina ætlan klára og fóru sjálvur at byrja virksemi á teirra virki her í bygdini.

Enn er onki hent í Vági og neyvan fer nakað virksemi at byrja aftur har!

Nú Framtaksgrunnurin hevur avgjørt at koyra okra suðuroyarvinir til hús, er væntandi at okra illi andi, Fiskavirking, fer at niðurleggja alt virksemi, bæði í Hvalba og á Palm Seafood í Vági?

Er tað hetta sum Løgmaður og Djurholm hava at geva okum suðringum í jólagávu?

Er hettar nakað sum okra samgongu tinglimir, Johan Dahl, Hendrik Old og Sverri Midjord, kunnu taka undir við?

Einskiljing merkir tað, at okur suðringar skulu fráskiljast allan ágóðan / alt fiskaarbeiði innan fiskavirking á landi í Føroyum, áðrenn Framtaksgrunnurin selur okra fiskavirki til norðoyingar/íslendingar, ella?

Taka Suðuroyar tinglimirnir undir við, at fiskavirking fær størri ávirkan á fiskaarbeiði í Suðuroy?

Hava tykur ikki skilt, at okur suðuroyingar nú í 12 ár hava stríðst við at fáa hetta felag til at lata fiskavirkið í Vági upp?

Hvat fer nú at henda við flakavirkinum í Hvalba og virkseminum á Palm í Vági?

Havandi í huga at okra landstýrismaður í fiskivinnumálum ætlar at gjøgnumføra broytingar sum noyða okra fiskiskip at avreiða í Føroyum.

Hvussu samsvarar hettar við hesa ætlan, nú fiskakeyparin á landi er eitt monopol?

Hvat fer hettar at merkja fyri okum suðuroyingar, sum nærum ongi fiskavirki eiga, men sum tó enn eiga nøkur fiskifør?

Fara nú øll okra fiskiskip á húsagang vegna vánaligar fiskaprísir-monopolprísir?

Hygg at baksíðuni í Sosialinum í gjár. Er hettar vinnupolitikkur javnaðarfloksins, Hendrik Old?

Teir tríggir í fangabúnað. Vinnulívsmenn við áræði og hugsjónum, sum sóu Suðuroy sum eitt potentiali.

Teir, sum løgdu upp til, at Suðuroy bleiv feskfiskaoyggj burturav og sum settu vinnu á stovn í Suðuroy, á virkinum í Hvalba og á Palm í Vági, eru hesir av javnaðarflokkinum/formanninum í vinnunevndini, skýrdir bandittar!

Góðu suðuroyingar: Tykur, sum hava valt hesar, okra menn í Tinganesi og á Løgtingi, haldið eyguni við, hvat teir gera, og fá teir burtur, áðrenn teir heilt forkoma okum øllum.

# Munnligur fyrispurningur til løgmann

**Hergeir Nielsen**
*løgtingsmaður*



Er løgmaður samdur við løgtingsformanninum í,

- at landið ongar strategiskar og ítøkiligar ætlanir hevur fyri 2005 og árini fram eftir
- at landið liggur í atgerðarloysi og rekur fyri vág og vind, og
- at vinnuliga, politiska og menningarliga støðan í landinum er so hættislig, at ikki ber til at seta orð á hana.

**Viðmerkingar:**

Fyri einum mánaða síðan sóknaðist løgtingsformaðurin alment eftir hví:

" - ongi ítøkilig áhugamál eru í Japan í løtuni."

Og hann legði afturat:

"Talan er um næststørsta búskapin í heiminum og størstu valutagoysluna í heiminum. Landsstýrið og vinnan svara løgmanni stutt og greitt! "ongi ítøkilig áhugamál í løtuni".

±

Løgtingsformaðurin sýntist lamsligin yvir, at løgmaður var so væl nøgdur, hóast atgerðarloysi í vinnuni, og staðfesti síðani:

"Og løgmaður er væl nøgdur. Sigur hetta ikki meira um okkara støði á politiska økinum, á vinnuliga økinum og á menningarliga økinum, enn ein kann lýsa við vanligum orðum?

Løgmaður verður tí spurdur, um hann sær seg føran fyri at seta orð á tey út av lagi hættisligu viðurskiftini á politiska, vinnuliga og menningarliga økinum.

Um dagarnar sóknast so løgtingsformaðurin aftur eftir, hvørjar ætlanir Føroyar hava fyri framtíðina?

Hann sóknast ma. eftir, um ikki:

"landstýrið og stóra sterka samgongan átti at sett út í kortið og at gjørt nakað ítøkiligt og munagóð tiltøk, sum kundu flutt Føroyar fram á leiðini."

- og ásannar, at:

"tað kann ikki góðtakast, at meðan grannarnir og Europa gera skarvslop fram eftir, so skvamblar okkara sterka landstýri og okkara stóra sterka samgonga uttan mál og mið runt í egnum dunnuhyli. Her má vend koma í.."

"Føroyar hava brúk fyri strategiskum og ítøkiligum ætlanum fyri 2005 og árini fram eftir," sigur løgtingsformaðurin at enda, og staðfestir evsta parlamentariska leiðsla landsins sostatt alment, at landið onga strategi og ongar ætlanir hevur frameftir, og sostatt liggur í atgerðarloysi og rekur fyri vág og vind..

# Konsert í Havnar kirkju

**Barnakórið Droparnir og Glymur jólakonsert í Havnar kirkju**

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin komandi, kl. 16.00, verður fjølbroytt jólakonsert í Havnar kirkju, har barnakórið Droparnir, undir leiðslu av Sigrid Sivertsen, og kórið Glymur við Julian Rasmussen sum leiðara fara at syngja jólasangir.

Droparnir er barnakór, ið m.a. er kent frá sangleikinum Jósef. Glymur byrjaði í 1984 sum rútmiskt kór, men syngur nú sangir innan nógvar sanggreinar.

Talan er um fyrstu ferð, at Droparnir og Glymur hava konsert saman.

Skráin, ið er sett saman av sangum og sálmum, ið hoyra jólunum til, er fjølbroytt, og fara kórini, umframt at syngja hvør sín part, eisini at syngja saman í seinnu helvt av konsertini.



Konsertin er ókeypis og bjóða vit øllum hjartaliga vælkomin til hesa hugnaløtuna.

# Menningarlæra og átrúnaður eru ikki sambærilig

TINHELLUDEBATTIN

*Pól Jespersen*
*cand. scient.*

Í Tinghelluni í vikuskiftissosialinum 27. og 28. november siga teir fýra, Richard Schwartson, Ejvind Mouritsen, Símun Absalonsen og Jens Andreassen, seg vilja leggja upp til kjak um spurningin um uppruna heimsins og ikki minst upprunan til sjálvt lívið. Yvirskriftin til greinarøðina er "Skapanarlæra mótvegis menningarlæru". Eg má siga sum er, at eg eri púra skelkaður av tí, hesir menninir skriva. Vita teir ikki betur, ella eru teir blindaðir? Longu tá ið tú hevur lisið fáar reglur, kennir tú á tær, at tú ert lumpaður, vavdur inn í eina missionerandi, manipulerandi roynd at "prógva", at einki skil er í vísindunum og at einasti møguleiki at skilja náttúruna er at postulera ein kreatør - ein skapara. Hetta prátið er langt av allari leið.

Vísindi og trúgv eru hvørt sítt. Longu í yvirskriftini fara teir 4 skeivir. Skapanarlæra kemur undir trúgv og menningarlæra er eitt ávegis ástøði at skilja tað yðjandi lív, sum jarðarknøtturin ber. Tað ber ikki til at seta hesi bæði upp sum mótsetningar, tí tey eru ikki sambærilig. "Vit síggja ikki Gud, líka lítið sum vit síggja elektronir, men bæði opna upp fyri víðu víddum veruleikans", siga teir fýra. Hetta er tvætl. Vísindini kunnu gera royndir við elektronum, at fáa sum mest at vita um henda løgna atombitilin, men tú kanst ikki við vísindaligum royndum prógva ella mótprógva, at ein skapari er til. Hetta er høpisleys tala.

Náttúruvísindini hava sett sær sum mál at royna at avdúka tær reglur, sum náttúran virkar eftir. Tað verður gjørt við serligum vællýstum vísindaligum arbeiðslagi. Tað stendur einum og hvørjum frítt at kanna eftir, hvat ið góð siðvenja er í hesum sambandi. Ræ̈ttiligt vísindafólk siga seg ikki vita nakran endaligan sannleika. Ivin er fremsti fylgisveinur hjá vísindafólki, sum vilja verða tikin fyri fult, eisini hjá Darwin.

Eg ætli mær ikki at kjakast vit teir fýra, tí tað ber ikki til at kjakast við fólk, sum vita svarini frammanundan, men eg vóni, at fólk, sum hava skil fyri vísindum, og serliga lívfrøði, fara at taka til orðanna ímóti tí, hesir fýra bera fram.